# /songwriter



*Høgni Reistrup hevði eina sera góða framførslu*



*Dómararnir vóru Terji Rasmussen, Høgni Zachariassen og Kim Hansen*



*Fyrst á pallinum var Kári Páll Nolsøe*

eg, at sangirnir vóru eitt sindur einstáttaðir. Framførslan hjá Kára var bara ikki so spennandi sum hinar báðar. Men tað sigur kortini meira um Jensinu og Høgna, enn tað sigur um Kára. Tey vóru øll trý framúrskarandi hetta kvøldið.

### Høgni Reistrup

Høgni Reistrup er serliga kendur frá GBOB-vinnarunum Deja-Vu. Hann hevur verið við í kappingini í 2003, har ið hann eisini var í finaluni uttan at vinna. Eingin ivi er um, at Høgni er ein sera evnaríkur ungur maður, sum hevur mangar streingir at spæla uppá.

Eyðkent fyri framførsluna hjá Høgna var hansara fína fingraspæl. Hann spælir mangan við ólogiskum akkordum og torførum tempo. Hann megnaði tó væl at halda træðrirnar saman.

Høgni hevur eina fína pena rødd. Hon er rættiliga veik, men hann dugir væl at nýta hana. Løgini eru friðarlig og meladiskar balladur. Teksturin er poetiskur og minnir um yrkingar.

Serliga síðsti sangurin hjá Høgna ”Tak meg við” fangaði oyrað. Har spældi Høgni munnharpu og gittara samstundis. Hetta prógvar eisini, hvussu evnaríkur hann er, og hvussu fjølbroytt evnini eru. Fólk nikkaðu til hendan sangin, sum var eitt sindur lívligari enn hinir.

Síðsta lagið var eitt veruligt klimaks í framførsluni hjá Høgna. Lógvabrestirnir vóru øgiligir, og nógv hava uttan iva hugsað: ”hetta er vinnarin”.

### Jensina Olsen

Til seinast kom Jensina Olsen á pallin. Tað hoyrdist, at hon er sera væl umtókt millum fólk. fetir lógvabrestunum at døma, var hon publikums-favoritturin hetta kvøldið.

Jensina livdi eisini upp til vónirnar.

Fyrsti sangurin var ein kærleikssangur. Hon hevur eisini sera kraftmikla vakra rødd, sum tó eisini meistrar teimum vøkru høgu tónunum. Næsti sangur var um sorg og sakn. Hon livir seg sera væl inn í tað, sum hon syngur. Tað er samsvar millum tekstin og huglagið í lagnum. Jensina sang melankolskt og gandakent. Hon minti um eitt álvafljóð, sum syrgdi um sín mista kærleika. Flott lag, sum veruliga klingaði í oyrunum. Aftur her havi eg hug at nevna, at ljóðblandingin var framúr góð.

Síðsti sangurin var á enskum. Teksturin var skemtiligur, og lagið var meira lívligt enn hini bæði. Hon hevði nøkur ”breaks”, sum veruliga sótu væl. Í hesum lagnum vísti hon veruliga, hvussu gott tamarhald, hon hevur á røddini, tá ið hon skreiðaði oman og niðan gjøgnum oktavirnar. Hon endaði við einum flottum ”fade-away”.

Jensina var ein verdur vinnari hetta kvøldið. Støðið í finaluni var sera høgt, og tað var ein góð tónleikaupplivíng hjá áhoyrarunum.